Bolivia - Kreppan:

# Tá altjóða feløg ikki taka sosiala ábyrgd

**Tá tosað verður um oljuvinnu, standa vit í somu støðu sum Bolivia. Vit hava hvørki serkunnleikan ella váðafúsa kapitalin til at standa fyri arbeiðnum sjálvi, og mugu tí hava útlensk feløg inn at taka sær av hesum, sigur Bogi Eliasen millum annað**

VINNUANALYSA



*Bogi Eliasen*

Seinastu vikurnar hevur Bolivia verið á breddanum. Talan hevur verið um mótmælisgongur og innlendis ósemju, sum nú hava fingið forsetan, Carlos Mesa úr sessinum. Ein stórur partur av stríðnum snýr seg um náttúruríkidømi, í hesum føri serliga gass og olju. Hesin forsetin var tó bert varaforseti, og sat fyri upprunaliga valda forsetan Gonzalo Sanchez de Lozada, sum fór frá vegna somu trupulleikar fyri 20 mánaðum síðan. Bolivia er kent fyri serliga nógv stjórnarskifti og ikki minst kvett.

Landið verður mett, at verða tað fátæksta landið í Suðuramerika og er á listanum yvir 18 londini, sum sambært semjuni millum sonevndnu G8 londini, fáa skuldina avskrivaða í næstum.

### Fátæku krevja sítt

Tey sum mótmæltu harðast, tey fátæku, krevja at fáa ágóða úr hesum vinnum, meðan ríkari parturin av landinum, og serliga har sum gass og oljuvinnan er, ikki ynskja at plága feløgini. Hjálandasøgan eigur eisini ein stóran leiklut her. Tey fátøku, sum sjálvdan fáa nakran ágóða av at útlensk feløg koma inn, settu nú føtur í spenn. Í teirra eygum hava tey fyrst verið rænd sum hjálond, og síðan hevur lítð og einki av náttúruríkidøminum verið brúkt til landsins menning. Ein fólkaatkvøða var um hetta í juli í fjør, og tá var tað meiriluti fyri at skatturin skuldi setast til 50% og inntøkurnar brúkast til heilsuverkið, útbúgving, vegakerv og at skapa meira arbeiði. Hóast avtalan er, at peningurin sum kemur inn í skatti frá útlensku oljufeløgunum, skal fara til millum annað at betra um heilsuverkið, so mettu mótmælisfólkini ikki at tað var nóg mikið, og hørð krøv hava verið um at tjóðartaka allan ídnaðin. Lógin var til viðgerðar, nú alt rumblið kom. Ríkari parturin av landinum og samstundis har sum olju og gassvinnan er, hava samstundist kravt autonomi, fyri at verða leysari av fátækra partinum av landinum, og helst eisini roynt at sleppa undan herðingunum á oljuvinnuna. Tí bleiv stríðið so hart og fløkt.



*Oftani kann tað tæna stóru feløgunum, um tey av sær sjálvum vísa samfelagsliga ábyrgd*

### Sosiala ábyrgdin

Uttan at fara í smálutir við júst Bolivia, so er hetta afturvendandi søgan um, at útlensk feløg ikki taka sosiala ábyrgd, ella í hvussu so er fólksins fatan at tey ikki gera tað. Men hví skulu tey tað? Tað noyðast tey heldur ikki. Tey hava fullan rætt til at arbeiða út frá settum treytum, og so royna at vinna so nógvan pening sum gjørligt. Vinnufeløg hava jú sum endamál at vinna pening og onkursvegna at hava størst møguligt avlop. So sigast kann, at um tey nú leggja skatt eftir seg, má tað verða í ordan. Men so einfalt er tað ikki. Oljufeløg er ofta sterk, og støðan í londum sum Bolivia er, at antin eru ikki strangar umhvørvisreglur, ella verða tær ikki fylgdar. Tí hevur tað fylgjur fyri lokalsamfeløgini, tá slík vinna er.

### Sammett við okkum

Vit kunnu eisini samanbera støðuna við okkara egnu oljudreymar. Vit hava lagt nógv orku í at finna eina miðju, sum fær okkum sum mest burturúr, samstundis sum oljufeløg skulu varveita áhugan. Vit kenna tað tað eisini frá okkum, at vit vilja tryggja at eisini føroysk arbeiðspláss koma burturúr, at føroyskur serkunnleiki verður mentur og so ikki minst tann víðagitna keikantsreglan. Vit standa í somu støðu sum Bolivia, vit hava hvørki serkunnleikan ella váðafúsa kapitalin til at standa fyri arbeiðnum sjálvi, og mugu tí hava útlensk feløg inn at taka sær av hesum.

Stóri munurin er, at vit hava eitt rímiliga vælvirkandi samfelag. Í Bolivia ganga fólk svong, samfelagsskipanin er út av lagi vánalig, samstundis sum oljufeløg, í fólksins eygu, spinna gull uppá fólksins ogn.

Tað hjálpir heldur ikki upp á støðuna at t.d spanska Repsol, er eitt av stóru feløgunum, sum beinleiðis leiðir tankarnar aftur á hjálandatíðina.

Ein annar nærum ónevndur trupulleiki er, at fleiri av grannalondunum eru tengd at bíliga bolivianska gassinum, og tí kunnu koma í trupulleikar um framleiðslan steðgar.

### Tænir feløgunum at taka ábyrgd

Sum sagt í byrjanini lýsir íkomna støðan at altjóða feløg, bæði av samvisku, men eisini fyri egna skuld, áttu at hugsað meira um at verða við í lokalu menningini, har tey virka. Oljufeløgini hava heilt vist verið væl nøgt við at skula gjalda 18% í skatti og tí hevur Bolivia, hóast buldraligt politiskt, verið áhugavert. Um feløgini, t.d. tí at støðan er so ring í Bolivia, av sínum eintingum høvdu boðið sær til at goldið onnur 5% til t.d. útbúgving, høvdu tey bæði passa arbeiði, tikið sosiala ábyrgd og verið við til at ment landið, og av sær sjálvum gjørt góða marknaðarføring. Hetta kenna vit aftur úr oljugrunnunum í Føroyum.

### Hvat hendir í Bolivia

Hvat úrslitið verður í Bolivia, er ilt at meta um. Nú verður helst forsetaval í næstum, og kemur andstøðuleiðarin Morales í sessin, so verður stórt trýst á at tjóðartaka ídnaðin. Trupulleikin verður í hesum føri, at landið ikki hevur styrki við førleikum á økinum. Hinvegin so er Bolivia, sum sagt á listanum yvir lond, sum fáa strikaða sína skuld. Tí merkir hetta, í hvussu so er, at Bolivia fær ein møguleika at byrja av nýggjum.

# Búskaparpolitikkur,Trælanípan og tabloidpressan

**Hetta skal nú ikki vera nøkur lektión í búskapi. Men tá vit tosa um eitt hall á umleið kr. 500 mió hjá landskassanum, so er orsøk til at ansa eftir**

VINNUSÍÐUKRONIKK

*Gordon Ejdesgaard*



Mær vitandi, er kjakið um oljustudning til rækjuflotan gott. Men hvar er kjakið um hallið á fíggjarlógini ella tær kr. 500 milliónirnar. Og sum skulu lánast, fyri so at skula gjaldast aftur.

Skal landskassin ikki framhaldandi hava hall skulu munandi broytingar gerast í búskaparpolitikkinum. Her er ein møguleikin sparingar og herundir uppsagnir. Annar møguleiki kann vera at økja landskassans inntøkur. Tað merkir øktan skatt og avgjøld. Triði møguleikin kann vera at fíggja eitt undirskot við lánsbrøvum t.e økja landskassans skuld. Brúkar landsstýrið henda triðja møguleikan fær landsstýri eitt "timeout". Eina tíð at hugsa seg um í áðrenn broytingarnar hóast alt skulu gerast. Og eingin grund er til at trúgva, at fiskivinnan kann vera við til at loysa trupulleikan. Tilmælini fra ICES og Fiskirannsóknarstovuni eru ikki bjørt.

Men óansæð kostin so er hann herskin.

Ein kann spyrja: jamen, er tað bara lagi, at vit, børn sum vaksin fáa eina rokning uppá 11 túsund krónurfyri fyrst? Peningurin skal jú gjaldast fyrr ella seinni. Hetta samstundis sum vit hava ein skattalætta koyrandi. Skil hvør ið kann, men sum búskaparfrøðingur, standi eg sum kánus. Her er okkurt "rav ruskandi gali". Tað sum mær tykist serliga galið er, at hallið kemur, at síggja til, óvanta.

Skulu vit veruliga hava mist fótafesti á Trælanýpuni áðrenn veruleikin verður ásannður?

Alt bendir á at vit hava ein sera veikan búskaparpolitikk. Ella ein órudduligan og óskipaðan búskaparpolitikk. Eg vil fegin taka tráin upp eftir R. Nónfjall í kjakinum um hesi viðurskiftið og um politiskar avgerðir ella manglandi avgerðir. Hvaðani stavar hallið? Neyvan frá fólkapensiónini. Hevði landsstýrið t.d. ikki givið skattalættan, var hallið munandi minni. Og hvussu nógv arbeiðspláss hevur skattalættin givið?

Ein kann fáa illgruna um at mistøkini verða endurtikin. Ein kann kanska kalla tað reglubundin mistøk.

Men óansæð um talan um reglubundin mistøk og ikki óhapp, so eigur frágreiðingin at fyriliggja. Vit tosa jú um at hava mist 5 (fimm) rækjuskip á 100 milliónir, um vit sammeta. Hetta eftir einum ári.

Í so fall talan er um reglubundin mistøk, hava vit mist fótafesti. Og kunnu veittra farvæl til Trælanípuna.

Tí vit eru á veg til botns! Búskaparfrøðingar plaga at mæla til ein javnan vøkstur í búskapinum, lágt arbeiðsloysi og javnvág á fíggjarlógini.

Her hava vit lítlan óstóðugan vøkstur (um nakran), høgt arbeiðsloysi og knappligt ógvusligt hall á fíggjarlógini- og tað gerst møguliga verri.

Hvørki bløð ella kringvarp hava, mær vitandi, kannað fíggjarliga trupulleikan og avleiðingarnar av hallinum fyri samfelagið. T.d.: Hvat kann henda, um eingi tiltøk verða sett í verk?

Ongin kanning, eingir spurningar og umleið 100 fólk starvast í kringvarpinum. Fjølmiðlafólk okkara, sum eg síggi tingini, seta kikaran fyri blinda eyga. Ella eru fjølmiðlar okkara við at gerast ein samlað tabloidpressa við speciali í túnatosi?